At senda til TAKS

TAKS
Postrúm 2151
FO-110 Tórshavn

# Umsókn um at varðveita fulla skattskyldu í Føroyum

## 1. Persónsupplýsingar (Bústaður uttanlands skal upplýsast her)

| | |
|---|---|
| Navn: | P-tal: |
| C/o: | Postsmoga: |
| Gøta og nr.: | Telefon: |
| Postnr. og bygd/býur: | Dagfesting: |
| Teldupostadressa: | Fartelefon: |

Við heimild í §1, nr. 3 í skattalógni søki eg um fulla skattskyldu í Føroyum, meðan eg eri undir útbúgving uttanlands. Samstundis vátti eg, við atliti til § 139 í somu lóg, at eg havi svarað rætt upp á niðanfyri standandi spurningar, og leggi við umbidnu prógvini

## 2. Spurningar

| |
|---|
| Hvørja útbúgving byrja tygum ? |
| Navn og bústaður lærustovnsins ? |
| Nær byrjar/byrjaði útbúgvingin ? |
| Nær verður útbúgvingin liðug (ásetta tíðin) ? |
| Í hvørjari kommunu í Føroyum búðu tygum seinast ? |

**Avrit av váttan frá lærustovni skal fylgja við**

______________________ , tann / 20 ___ ______________________________
Undirskrift

**S10** 030605

**Kunngerð**

**nr. 109 frá 5. juli 2001**

**um**

**lesandi og lærlingar uttanlands**

Við heimild í § 1, nr. 3 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum m.a. broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 30. desember 1997, verður ásett:

**§ 1.**

Lesandi og lærlingar uttanlands, sum áðrenn lestur ella læru hava havt fastan bústað í Føroyum í minst 4 ár, eru sambært § 1, nr. 3 í lógini fult skattskyldug í Føroyum.

**§ 2.**

Við lesandi og lærlingar eftir § 1 er at skilja persónar, sum fara uttanlands í lestrar- ella útbúgvingarørindum við t.d. lærdan háskúla, skúla innan handil og ídnað, sjóvinnu, landbúnað, handverk, flogvinnu, sjúkrarøkt ella tænastuvinnu.

**§ 3.**

Fyri at koma undir hesar reglur, skal viðkomandi persónur lata Toll- og Skattstovu Føroya upplýsingar um útbúgvingina, útbúgvingarstað og ásetta lestrartíð og altíð kunna vátta, at ein framhaldandi er undir útbúgving. Upplýsingar um broytingar í útbúgvingini, t.d. um persónur gevst við útbúgvingini ella skift verður til aðra útbúgving, skulu eisini latast Toll- og Skattstovu Føroya.

**§ 4.**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2001. Samstundis fer kunngerð nr. 15 frá 19. Juli 1989 frá Líkningarráð Føroya um lesandi og lærlingar uttanlands úr gildi.

Fíggjarmálastýrið, 5. Juli 2001